Skrivað hevur: Rigmor Dam
Myndir: Sunva E. Lassen

# brunch við babba



Poetisku orðini eigur Steintór Rasmussen (47), sum situr saman við spælibróðurinum Rana Nolsøe (48) – báðir við hvør sínari fimm ára gamlari dóttur, ávikavist Rakul og Juliu.

- Tað hevur nokk altíð ligið í kortunum, at vit fóru at fáa ein eftirnølara, sigur Steintór. Hann heldur sum so ikki, at tað hevur givið honum eitt nýtt perspektiv í lívinum, men heldur møguleikan at varðveita perspektivið í lívinum.

- Eg verið líkasum hangandi í umhvørvinum. Til dømis havi eg framvegis samband við yngri foreldur og barnagarðar, og stóran áhuga fyri skúlaviðurskiftum og tilboðum til børn og ung í Klaksvík, sigur Steintór, sum sjálvur er lærari.

Rani Nolsøe heldur tað vera púra natúrligt, at hann enn er smábarnapápi, tí hann var 30 ár, tá hann fekk fyrsta barnið.

- Eg havi altíð verið seinur upp á tað, sigur hann og flennir, men leggur álvarsligari afturat, at tá hann gjørdist pápi í 40unum, koyrdi lívsprojektið við fullari ferð, og tí noyddist hann at steðga á.

- Síðstu fimm árini havi eg verið innskrivaður í hin skrappasta og mest fokuseraða skúlan, eg nakrantíð havi gingið í, sigur hann, og vísir á, at størsti lærdómurin var at fáa eina dóttur, tí hann átti bara synir áðrenn.

- So tað hevur verið heilt fantastiskt fyri meg at fáa eitt feminint univers inn í lívið; sum at vitja ein fullkomiliga ókendan heim, sigur Rani Nolsøe, sum er stjóri í Íverksetarahúsinum.

## Strævið við fleiri

Tá Rasmus Magnussen og konan fingu boðini um, at tvíburar vóru á veg, avtalaðu tey beinanvegin, at tey skuldu geva pláss fyri teimum í lívinum, millum annað við at geva sær góðar stundir til at vera foreldur.

- Tað kom sjálvandi óvæntað á okkum, men vit vóru sera spent og glað. Vit eru kropsliga væl fyri og hava eitt gott bakland við eldri børnum og ommu og abba í húsinum, sigur Rasmus, sum kortini ikki dylur fyri, at tað til tíðir er rættiliga strævið við tveimum lívligum smágentum í húsinum.

- Við tvíburum er tað nógv meira enn bara eitt ganga eitt. Tær eru allastaðni og rýma fyri eitt gott orð, sigur Rasmus Magnussen, sum er sølumaður hjá Senta. Tí prísar hann seg lukkuligan fyri, at so nógvar hendur eru um tær smáu heima við hús.

Hetta kennir Kári á Presttrøðni (50) úr Miðvági alt til. Hann er arbeiðsformaður hjá Fiskavirking og pápi at seks børnum, sum øll búgva heima. Tann elsti er 18 ár, meðan tey bæði yngstu Mary, 4 ár, og lítli Kári, 2 ár, eru sloppin við babba til Havnar í dag.

- Tað er forbiðið strævið at hava so nógv børn, viðgongur Kári blankt. Og hann greiðir frá, at konan hevur gingið heima hjá øllum børnunum, tí tað hevði ikki loyst seg fíggjarliga at koyrt tey á stovn. Kári heldur eisini, at hann sjálvur er merktur av aldrinum, og at fjúsið til tíðir er nakað stutt.

> - Eg og konan eiga trý børn:
> Tað fyrsta var eitt kærleiksbarn, tað næsta eitt ynskibarn og eftirnølarin eitt undurbarn.
>
> Steintór Rasmussen, 47 ár

- Tí er tað ein lætti, at tey eldri børnini taka sær av teimum yngru. Elsti sonurin keypir teimum ofta okkurt lekkurt heim við, og sum heild verða tey forkelað av teimum eldru, sigur Kári. Hann greiðir eisini frá, at tað var ikki ætlanin at fáa so nógv børn.

- Eg helt, at fýra børn vóru nokk. So eg visti, at tað fór at vera strævið, tá nummar fimm og seks komu. Men soleiðis er so mangt, sigur hann.

## Forskotin ættarlið

Rasmus Magnussen nevndi, at tey vóru trý ættarlið í húsinum, tí omman og abbin búgva saman við teimum. Eisini vísti hann á, at hetta er ein góð hjálp hjá teimum, nú tvíburarnir eru komnir. Men hetta við ommum og abbum kann vera ein reellur trupulleiki, tá man fær børnini so seint, tí sannlíkindini fyri, at tey gomlu enn eru á lívi, minka sjálvandi tess eldri ein sjálvur er. Prátið um ommur og abbar fær eisini Øssur Winthereig (49), tíðindaleiðara í sjónvarpinum, at reagera. Hann hevur ofta saknað ommur og abbar til skjótt eitt ára gamla Jens. Øssur sjálvur var eisini eftirnølari, tá mamman fekk hann 42 ára gomul.

- Hjá okkum eru ættarliðini púra forskotin. Míni systkin vóru so nógv eldri enn eg, pápi doyði í 1968 og abbi longu í 1922. Og av tí, at konan er donsk, hevur hon ikki foreldur her, sigur Øssur, sum hervið eftirlýsir ommur og abbar til lítla Jens.

Øssur eigur eisini vaksin børn, og kundi fyri tað verið abbi. Hann minnist enn, hvussu óð onnur dóttirin bleiv, tá hann ringdi niður og fortaldi, at hon skuldi vera stórasystir.

- Tað lá líkasum í luftini, at eg var ein gamal stoddari, og hvat hundunum liggur tú og gert maður? sigur hann. So hann fór niður til hennara við fyrsta flogfarinum og fekk á vegnum tíð til at hugsa um hetta, at hann skuldi vera pápi aftur.

- Tá kom eg til ta niðurstøðu, at tað gevur lívinum eitt spildurnýtt perspektiv, sum eg ikki visti, at eg fór at fáa aftur, sigur hann, og skundar sær at leggja afturat, at báðar tær vaksnu døturnar eru sera glaðar fyri lítlabeiggjan.

- Tá man fær børn sum 25 ára gamal furar man runt fyri at skapa sær eina karrieru, og øll orkan fer til arbeiðið í staðin fyri

Ingi Vestergaard (49) við 3 ára gomlu Astrid

